# Skattainntøkurnar hægri í ár enn tey undanfarnu árini

**Skattainntøkurnar teir fyrstu sjey mánaðirnar í ár vóru munandi hægri enn sama tíðarskeið árini fyri. Tøl frá Toll- og Skattstovuni vísa, at higartil í ár er A-inntøka føroyinga komin upp á 4,1 milliardir krónur í mun til 6,9 milliardir krónur alt árið í fjør**

BÚSKAPUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

– Tað stendur væl til í Føroyum.

Hetta segði løgmaður í røðu síni í Løgtinginum ólavsøkudag, og sambært teimum nýggjastu tølunum frá Toll- og Skattstovu Føroya vísir tað seg, at skattainntøkurnar higartil í ár hava verið væl hægri í mun til somu tíðarskeið undanfarnu árini.

Hóast verandi samgonga hevur samtykt at veita 90 milliónir krónur í skattalætta, sum verða latnar av landsskattinum, so eru fyribils skattainntøkurnar í ár munandi hægri í ár enn tey undanfarnu árini.

Í 2004 var A-inntøkan hjá føroyingum góðar 6,7 milliardir krónur og alt árið í fjør 6,9 milliardir. Teir fyrstu sjey mánaðirnar í ár eru A-inntøkurnar longu komnar upp á 4,1 milliard.




*Stabbamyndin vísir, at fyribilsskatturin hevur verið munandi hægri í ár enn undanfarin í ár. Í marsmánaði var A-inntøka føroyinga 642,6 milliónir krónur, og var inntøkuríkasti mánaðin higartil í ár*

## Hægri kommunuskattur

Í julimánaði í ár vórðu 600 milliónir krónur skrásettar sum A-inntøka í mun til 545 milliónir í juli í fjør. Besti mánaði í ár fyri landskassan var marsmánaði, tá 642,6 milliónir krónur vórðu skrásettar sum A-inntøka.

Fleiri kommunur hava ta seinastu tíðina hækkað kommunuskattin, men hóast inntøkurnar í kommunuskatti tí áttu at verið hægri, so er inntøkurnar frá kommunuskattinum hægri, enn flestu kommunur høvdu roknað við. Í julimánaði í ár rindaðu føroyingar 100,5 milliónir krónur í kommunuskatti í mun til 87 milliónir krónur sama mánaða í fjør.

Tilsamans hava føroyingar goldið 607,4 milliónir krónur í kommunuskatti teir fyrstu sjey mánaðirnar í ár í mun til 1,1 milliard alt árið í fjør.

# Løgmaður vardi seg

**Løgmaður gjørdi stutt fyri middag viðmerkingar av tingsins røðarapalli tey ringu skotsmálini, sum andstøðan hevur givið løgmansrøðuni á ólavsøku**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Løgmaður vardi seg í tinginum í dag*

Síðani Jóannes Eidesgaard, løgmaður helt sína triðju løgmansrøðu ólavsøkudag, hava floksformenninir í andstøðuni nýtt høvi til at gera viðmerkingar til røðuna. Sum vera man hava hesar viðmerkingar verið rættiliga atfinningarsamar.

Sosialurin royndi í morgun at fáa viðmerkingar frá Jóannesi Eidesgaard til sjálva løgmansrøðuna og til kritikkin frá andstøðuni, men løgmaður vildi ikki gera viðmerkingar fyrr enn hann hevði verið tingsins røðarapalli. Sostatt eydnaðist ikki at fáa eina samrøðu við løgmann, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Edmund Joensen, tingformaður, setti tingfundin í morgun klokkan 9, har løgmansrøðan varð umrødd. Stutt fyri middag slapp løgmaður framat, eftir at serliga formaður Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, hevði funnist hvassliga at verandi samgongu. Høgni Hoydal tosaði nógv í myndum segði m.a., at samgongan líktist einum fótbóltsliði, ið als ikki vil spæla fótbólt.

Jóannes Eidesgaard segði m.a. at í øðrum parlamentum var tað altíð við spenningi, at bíðað verður eftir hvat andstøðuleiðarin hevur at siga, men at hann var vónbrotin av røðuni hjá formanni Tjóðveldisfloksins í morgun.

Hinvegin rósti løgmaður framsøgumonnum Sjálvstýrisfloksins og Miðfloksins.

Løgmaður vildi vera við, at røðan var konkret, sum t.d. Miðflokkurin hevur sagt, at hon ikki var. Løgmaður vísti á, at eini 90 mál eru nevnd í løgmansrøðuni, og hann helt ikki, at Fólkaflokkurin átti so stóran part av røðuni, sum fleiri í andstøðuni vildu vera við.

Løgmaður vildi eisini vera við, at Høgni Hoydal vildi fremja karaktermorð ímóti honum, men hesum vísti Høgni Hoydal staðiliga aftur.




Shell søkir eftir nýggjum leiðara til tær báðar Shell-støðirnar í Havn - við Norðara Ringveg og á Frælsinum.
Leiðarin hevur fulla ábyrgd av dagligu leiðsluni og rakstrinum av Shell-støðunum
Talan er um eitt avbjóðandi, ábyrgdarfult og sjálvstøðugt starv, har tann rætti persónurin hevur góðar møguleikar at seta sín egna dám á tær báðar støðirnar í samstarvi við leiðsluna hjá Føroya Shell.

**Vit ynskja ein persón, sum er royndur innan handil og annars hevur hesar eginleikar:**

- ✔ Leiðslusinnaður
- ✔ Ágrýtin
- ✔ Tænastusinnaður
- ✔ Fleksibul
- ✔ Samstarvssinnaður
- ✔ Álítandi
- ✔ Jaligur og opin
- ✔ Røkin

Løn sambært avtalu

Áhugað kunnu venda sær til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara, á telefon 347400 ella fartelefon 216899.

Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði og skulu í seinasta lagi mánadagin 21. august 2006 sendast til

Føroya Shell
Viðarnes
100 Tórshavn
att.: Erling í Liða

www.shell.fo

SISERO 351800